# fáa veruleikan á flog



*Bæði sum menniskju og rithøvundar eru Gunnar Hoydal og Rakel Helmsdal sera ymisk. Men tey brenna bæði fyri tí góða skaldskapinum, og tey hava bæði eitt serligt útsýni og opinleika, sum kanska kemur av, at tey bæði eisini hava røtur uttanfyri Føroyar*

sum skrivaði av trongd og brúkti langa tíð til hvørt lítið verk.

Ein góð skaldsøga skal eisini vera eitt ríkt verk, sigur hann. Fjølbroytni sæst til dømis í nógvum ymiskum frásøgnum, sum allar lýsa hvørja aðra.

Gunnarsa serliga rødd er eyðsýnd í stóru og ríku skaldsøguni, men Í Havsins Hjarta var ikki nakar lættur burður. Gunnar Hoydal byrjaði upp á søguna fyri 10 árum síðani, og í fyrstuni hugsaði hann sær eina triologi um trý ymisk ættarlið og teirra ferðing til og frá Føroyum.

- Men hetta var ov lætt, ov einfalt og ov keðiligt. Eg vildi hava okkurt, sum bant allar søgurnar saman, og tann reyði tráðurin gjørdist landið og verðin.

### Livandi søgan

Spurdur hví hann skrivar um sítt egna lív og verulig fólk og hendingar, sum hann kennir, svarar Gunnar Hoydal, at hann kanska ikki hevur hugflog til at finna uppá nakað heilt nýtt.

- Men listin liggur í arbeiðnum at fáa flog á veruligar søgur. Skaldskapur snýr seg ikki um tað privata, men um tað alment menniskjaliga, sum kemur fram tá rithøvundar finna kosmos í tí lítla.

Hann hevur arbeitt leingi við søguni, *Í havsins hjarta*, og úrslitið er als ikki tað, hann hevði hugsað sær av byrjan.

- Knappliga fær teksturin lív, og persónarnar akta ikki. Og so má ein finna seg í tí og fara inn og broyta og skriva umaftur. Og størsta lønin fyri meg sum rithøvund er at verða bilsin av mínum egna teksti, tí verkið er meira enn tað, sum eg væntaði.

Rakel Helmsdal lýsir sína arbeiðsgong á líknandi hátt. Staðið Port Janua kom so at siga av sær sjálvum, sigur hon.

- Eg hevði skrivað fleiri stuttsøgur uttan nakað ávíst umhvørvið. Men so sá eg, at tær gingu allar fyri seg á sama staði. Staðið fekk navnið Port Janua, sum merkir havnin hurð, og staðið gjørdist ein hugskotsmaskina, sum alla tíðina lat hurðar upp til nýggjar søgur, greiðir Rakel Helmsdal frá.

Hóast umhvørvið í søgunum ikki er kent, so er tað samansett av støðum, sum Rakel Helmsdal kennir.

- Í Port Janua eru bæði konditaríið í Havn og gøtan eg búði á í Frankaríki. Ongin av persónunum eru direkta fólk, sum eg kenni, men tey eru samansett av ymiskum kvalitetum hjá ymiskum veruligum fólki, sigur Rakel Helmsdal og siterar ein annan rithøvund fyri at hava sagt, at tann absolutti orginaliteturin er ikki til, og av ymiskum blómum ger man sín egna hunang, sigur hon.

### Misskilti rithøvundurin

Millum øll tey kendu fólkini í skaldsøguni eru eisini Janus Djurhuus og William Heinesen, hóast teir ikki verða nevndir við navni.

Gamli yrkjarin í Klaksvík vitjar familjuna, sum er flutt norð í mentamyrkri, og Gunnar og syskini verða send út at selja yrkingar. Men ongin keypir. Hetta er ikki annað enn brennivínsreyp, og maðurin skuldi verið settur í fongsul aftur, siga tey.

Eisini gamli rithøvundurin í Havn er troyttur av fólkum, sum ikki skilja. Hann orkar ikki longur at vera góður og klókur. Hansara egnu landsmenn lesa ikki tað, hann skrivar, og tey í hinum landinum kroysta lívið úr honum.

- Janus var høgt í metum millum lesandi fólk. Men vanlig fólk hildu hann vera øran, sigur Gunnar Hoydal.

Í skaldsøguni verður støðan í Føroyum samanborin við Chile, har »høvdu tey øll lurtað, alt landið og allur heimsparturin hevði hoyrt hann og skilt hann«.

Sambært Gunnari Hoydal er lítla samfelagið ikki nøkur forðan fyri stórum skaldskapi.

- Marques, Laxness og okkara egni William Heinesen eru dømi um at lítla samfelagið, tí burtur úr tí lítla kann koma eitt heilt kosmos, staðfestir Gunnar Hoydal.

Hví lítla samfelagið so ikki dugir at seta prís á stóra skaldskapin, vil hann ikki seta seg sum dómara yvir. Men kanska síggja tey ikki listina, men bara tað privata.

- Fólk um allan heim lesa William Heinesen, tí hansara skaldskapur er so almennur. Lítla sankornið, Havnin, verður eitt kosmos, sum øll menniskju kunnu kenna seg aftur í. Men fyri nógvar føroyingar vóru hetta privatar søgur, skrivaðar av manni, sum spilti tíðina burtur.

### Skaldskapur fyri børn

Alskurin til skaldskap fekk Rakel Helmsdal í líka stóran mun frá træskerandi pápanum sum yrkjandi mammuni.

- Pápi las altíð søgur fyri okkum, og hann førdi meg og beiggja mín inn í stóru og spennandi verðinar hjá Astrid Lindgren, Tove Jansson og J.R.R. Tolkien. Hann elskaði góðan skaldskap og setti ikki mørk fyri, hvat hann las fyri okkum, sigur Rakel Helmsdal.

Sjálv hevur hon skrivað bæði til vaksin og til børn, men tað fellir henni lættari at skriva til børn, tí barnahugflogið er meira óavmarkað.

- Men barnabókarithøvundar verða ikki roknaðir fyri at vera veruligir rithøvundar. Hetta er ikki nakað serføroyskt, tildømis hevur eingin barnabókarithøvundur nakrantíð fingið Nobels heiðursløn í skaldskapi, sigur Rakel Helmsdal.

Hetta er nokk so løgið, heldur hon. Tí tær góðu barnabøkurnar eru minst líka stór list sum nógvar aðrar skaldsøgur, og tað er ikki lættari at skriva til børn enn til vaksin, leggur hon dent á.

Manglandi virðingin fyri barnabókmentum sæst eisini aftur í miðlunum, heldur Rakel Helmsdal.

- Barnabøkur verða ikki ummaldar, og tað kann vera eitt sindur trist. Tey einastu ummælini eg fekk til seinastu bókina, var tað rós eg havi fingið frá børnum, sum eg havi møtt, sigur Rakel Helmsdal at enda.